# Sambandsflokkurin er einasta- og trygga alternativið

**(stutt aftursvar til Jóannes Eidesgaard)**

**Edmund Joensen**



Fyrst skal eg fyri ein ordan skyld sláa fast, at Sambandsflokkurin hevur eina greiða støðu til ríkisfelagsskapin, og hvussu hann skal nýmótansgerast. Hetta nýskipanaruppskot er kent í hvørjum heimi í Føroyum.

Jóannes Eidesgaard leggur ógrundað eftir Sambandsflokkinum og mær, fyri at hava skundað undir loysingina. - So hava vit hoyrt tað eisini. Sambandsflokkurin hevur greiða støðu viðvíkjandi ríkisfelagsskapinum, hetta vita allir føroyingar.

**Verri statt við Javnaðarflokkinum**

Tíverri kann ikki tað sama sigast um Javnaðarflokkin. Eg skal bara taka tvey tey seinastu dømini fram:

- Tað er ein veruleiki, at Javnaðarflokkurin tók undir við fyrstu síðu av samgonguskjalinum hjá hesi loysingarsamgonguni av fullum huga. Hetta boðaði sjálvur formaðurin frá, aftaná at samgonguskjalið var almannakunngjørt.
- Tað er ein veruleiki, at Javnaðarflokkurin sjálvboðin legði uppskot fyri løgtingið um at lække blokkstuðulin við 123 mió. krónum. Tað sigur einum og hvørjum føroyingi, at var Javnaðarflokkurin í samgongu við loysingarflokkarnar, so hevði hann fingist til at lækkað blokkin við fleiri ferið hesari upphædd.

Eyðkennið við Javnaðarflokkinum hevur júst verið, at hann í spurninginum um ríkisfelagsskapin hevur verið støðuleysur, og melur sum veðurhani.

Nú má stundin vera komin, hvar ið Javnaðarflokkurin finnur útav í hvørjum bólki hann vil verða. Tað kann ikki vera rætt, at tá rákið í veljarakanningum er samband, so skal Javnaðarflokkurin selja seg sum sambandsflokk, meðan Sambandsflokkurin verður hunddálkaður, um hann loyvir sær at yvirhálar hann í veljarakanningum.

Tað trygga- og einasta alternativið til loysingarætlanina er Sambandsflokkurin. Hann hevur eina greiða støðu til ríkisfelagsskapin, og er sambandsflokkur, líkamikið hvat veljarakanningar siga.

Tí kann veljarin trygt seta krossin við Sambandsflokkin á valdegnum.

# Vilja fremja fólkaynskið

**Elin Lindenskov**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Eitt lagnuval stendur fyri durum. Týsdagin skulu vit leggja støðið undir sjálvstýrispolitikkin - sum eisini fer at hava stóran týdning fyri eina komandi samgongu. Vit skulu gera av, um vit skulu stríðast fyri loysing saman við Tjóðveldis- og Fólkaflokkinum, stríðast fyri at varðveita eina bøtta heimastýrislóg saman við Sambandsflokkinum, ella um vit velja samstarv og loysnir saman við Javnaðarflokkinum.

Vit í Javnaðarflokkinum hava ein klokkukláran sjálvstýrispolitikk. Vit taka undir føroyska fólkaynskinum um broytingar í ríkisrættarviðurskiftunum. Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum byggir júst á hetta fólkaynskið, og við hesi lóg fær løgtingið fult vald í øllum yvirtiknum málum, og tað verður løgtingið - og harvið føroyska fólkið - sum ger av, hvørji mál verða tikin yvir.

Vit halda, at tað hevur stóran týdning, at hetta verður gjørt innan fyri ríkisfelagsskapin. Vit skulu sjálvandi laga búskapin til okkara samfelag, men tað skal gerast við skili, og hetta skal undir ongum umstøðum ganga út yvir vælferðina. Hetta er aðalmunurin á okkara politikki og politikki samgongunnar.

Vit í Javnaðarflokkinum hava ta fatan, at tað er við at upplýsa og við at samstarva, at tað ber til at fáa eina góða avtalu við danir um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Broytingar, sum staðfesta, at evsta valdið liggur hjá føroyska fólkinum, og hesum politikki fara vit framhaldandi at virka fyri, bæði á fólkatingi og á løgtingi.

# Gevið løgmanni eitt herðaklapp!!

**Jógvan á Lakjuni**
*tingmaður og valevni Fólkafloksins*



Tjóðskaparliga stavnhald Fólkafloksins er, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum.

Í hesum samgonguskeiðinum er tað sum ongantíð fyrr í Føroya søgu eydnast sjálvstýriskreftunum í Føroyum at savnast um hetta stóra málið. Hetta hava vit ikki minst Anfinni Kallsberg, løgmanni, fyri at takka. Vit hava sett út í kortið, og tað sum nú ræður um, er at halda saman frameftir, soleiðis at vit kunnu koma á mál.

Eg fari tí at heita á øll tykkum, sum hava staðið so stinn um Fólkaflokkin, um ikki at svíkja okkum heldur hesaferð. Tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri sjálvstýristilgongdina, at Fólkaflokkurin framvegis stendur á odda!

Veljarakanningarnar ganga eitt sindur ímóti okkum í løtuni, og sum heitur sjálvstýrismaður eri eg bangin fyri, hvørjar avleiðingarnar kunnu vera, um ov stórur munur verður ímillum teir stóru flokkarnar á sjálvstýrisvonginum.

Vit skulu minnast til, at hugsjónarliga er stórur munur á tí vinstrahalla Tjóðveldisflokkinum og tí borgarliga Fólkaflokkinum, men av tí at báðir flokkarnir hava verið líka stórir, hevur borið til at funnið semjur á flestum økjum saman við Sjálvstýrisflokkinum!

Góðu fólkafloksfólk og annars øll borgarliga sinnað sjálvstýrisfólk! Eg veit, at summi av tykkum halda, at Fólkaflokkurin hevur verið ov lunkaður í sjálvstýrismálinum. Hann meldar kanska ikki so klárt út og rópar kanska ikki so hart sum Tjóðveldisflokkurin!

Minnist kortini til, nú tit fara á val, at tað er undir fólkafloksleiðslu, at hesi størstu stig á sjálvstýrisleið eru tikin. Eg skal einki taka frá hinum samgonguflokkunum, men eg kenni meg sannførdan um, at eingin annar enn Anfinn Kallsberg hevði megnað hetta!

Farið tí á val og gevið løgmanni og Fólkaflokkinum eitt herðaklapp. Tað er alneyðugt, um stígur ikki skal koma í sjálvstýristilgongdina!

# Norðoyingar eru hóvligir !

**Elisabeth Joensen (Betta)**
*valevni Sambandsfloksins*



Tíverri hevur Sambandsflokkurin ikki fingið serliga stóra undirtøku í Norðoyggjum í mong ár. Tað merkir ikki, at meginparturin av norðoyingum ynskja fullveldi ella loysing. Mín fatan er, at fólkið her ynskir ein hóvligan sjálvstýrispolitikk, har málsøki verða yvirtikin, tá fíggjarligar umstøður eru til tess, og uttan at hetta gongur út yvir vælferðina.

Teir flokkarnir, sum áður umboðaðu henda hóvliga sjálvstýrispolitikkin, vóru Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin. Hesir flokkar hava staðið sera sterkir í Norðoyggjum.

Aftaná seinasta løgtingsval broyttu hesir flokkarnir kósina og gjørdist ramir fullveldisflokkar. Teir fóru niður til Danmarkar, saman við Tjóveldisflokkinum, og kravdu fullveldi her og nú, og tá ið teir ikki fingu tað, varð farið undir at fremja yvirtøkur, sum í 2002 koma at kosta okkum umleið 360 mill.krónur. Tað er eingin loyna, at stórur partur av veljarunum hjá Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum kenna seg sviknar. Tað var ikki hetta tey høvdu væntað.

Tað, ein ofta hoyrir frá hesum hóvligu norðoyingunum, er: Eg valdi Fólkaflokkin, ella eg valdi Sjálvstýrisflokkin, men eg taki ikki undir við fullveldispolitikkinum.

Til hesar hóvligu borgarligu sjálvstýrisveljarar vil eg siga: Tann politikkur, sum tit kunnu taka undir við, í verandi støðu, er sambandspolitikkur. Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins sigur millum annað: "Øll mál - uttan felags mál fyri ríkisfelagsskapin - skulu kunna yvirtakast." Felagsmálini eru: Kongshúsið, grundlógin, uttanríkismál, verjumál, gjaldoyra og rættarskipanin.

Eg fari tí at heita á tykkum øll, sum ikki taka undir við fullveldispolitikkinum, um at velja Sambandsflokkin.

Til seinast fari eg at venda mær til allar sambandsveljarar, sum so trúliga hava staði saman um flokk okkara: Latið okkum gera okkara besta til hetta fólkatingsvalið. Veljarakanningarnar geva okkum eitt umboð á danating, men sigurin er ikki vunnin, fyrr enn seinasta atkvøðan er tald.

Gott val øll somul.



## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Valdagurin ein ábyrgdardagur

**Jóannes Eidesgaard**
*floksformaður og fólkatingsmaður*



Nú syngur so hetta stutta valstríðið upp á seinasta ørindi. Nógv orð eru søgd, og nógv orð eru skrivaði, men týsdagin eigur veljarin endaliga og avgerandi orðið. Tá tiga vit politikkarar fyri einaferð skyld. Vit lata røðarapallar, mikrofonir, telefonir, upptøkutól og teldur fáa frið, tí hesin dagur er ikki okkara. Hetta er fólksins dagur burturav. Hetta er dagurin, tá fólkið fær orðið, og tí er ein valdagur ein hátíðardagur í okkara demokratisku skipan.

Men samstundis er valdagurin eisini ein ábyrgdardagur. Tí júst henda dag tekur veljarin nakrar avgerðir, sum kunnu fáa avleiðingar fyri okkum øll. Og tí er tað so umráðandi, at vit brúka henda okkara rætt við ábyrgd. At vit ikki lata okkum tøla av nøkrum, sum í løtuni rørist í luftini, men taka avgerðina um valið við kjølfesti í okkara virðing fyri okkara medmenniskjum og í virðing fyri tí samfelag, vit øll skulu liva í.

Politikkur er koma hvørjum øðrum við. Politikkur snýr seg um umsorgan fyri hinum. Politikkur snýr seg menniskjur.

Tí er tað eisini umráðandi, at vit valdagin hava orku og vilja til eisini at hugsa um hini. At vit ikki lata valdagin verða dagin fyri sjálvsøkni. At vit ikki lata valdagin verða dagin við "smartum idéum. Men at valdagurin er dagurin, har vit koma hvørjum øðrum við. At vit seta krossin soleiðis, at hann ikki bert kemur okkum sjálvum til góðar, men at hann so vítt gjørligt kemur allari fjøldini til góðar.

Góði veljari.

Javnaðarflokkurin hevur nú borið sín boðskap fram, og vit hava gjørt hetta opið og erligt. Hann kemur at seta stór krøv til okkara politiska arbeiðsdag, men vit vilja fremja henda politikk, tí vit meta hann at vera tann rætta, og tí vit vita, at eingin annar flokkur tekur sær av hesum málum á sama hátt. Men sterkari vit eru tess meira orku og eldhuga fara vit at leggja í henda arbeiðssetning. Men styrkina fáa vit ikki frá okkum sjálvum, men bert frá teimum veljarunum, sum vísa okkum álit.

Sjálvandi er avgerðin tín, men vit kunnu tó vissa teg um eitt, og tað er, at vit ikki svíkja tað álit, okkum verður víst.

Gott val komandi týsdag

# Fullveldi

**Bárður Nielsen**
*Valevni fyri sambandsflokkin*

Vit hava seinastu trý árini hoyrt um, at vit skulu hava fullveldið og harvið gerast eitt frælst fólk í okkara egna landið. Tað bleiv lagt út við, at vit skuldu rationaliserað okkara landsumsiting soleiðis at vit fingu ráð til at skerja blokkin, men tað fyrsta hetta landstýrið gjørdi var at økja um landsumsitingina, hækkað blokkin og enntá tryggja okkum blokkin í trý ár fram, fyri síðani at lækkað hann til næsta ár tá nýtt landstýrið tekur við.

Landsumsitingin er nú nógv størri og dýrari enn áðrenn hetta landstýrið kom til, men almanna- og sjúkrahúsverkið hava ikki merkt til øktu peninganýtsluna. Nógvir pengar eru brúktir til at gera kanningar og "óheftar" frágreiðingar um hvussu støðan verður, um vit fáa fullveldi. Og um ein dittar sær, at nevna okkurt úr hesum frágreiðingum, sum ikki ljóða so gott í fullveldisoyrum, ja, so er tað ein miskiljing ella beinleiðis ósætt. Men tíbetur er Føroya fólk meir rótfast enn so, at hesar frágreiðingar saman við miskiljingunum hava ikki tikið tey av fótum.

Um vit framhaldandi vilja verða eitt frælst fólk er loysnin, at verða verandi í ríkisfelagskapinum, men sjálvandi skulu broytingar gerast, dagføringar skullu til í einum og hvørjum landið, eisini hjá okkum.

Verið við til at tryggja vælferðina - veljið sambandsflokkin, lista B

# Babba, kanst tú gjalda

**Jógvan Sundstein**
*Valevni Fólkafloksins*



Tveir dreingir byrjaðu í skúlanum samstundis, sjey ára gamlir. Teir vóru bæði raskir og fittir og vóru evnagóðir. Annar æt Áki og hin æt Bárður. Páparnir báðir vóru fíggjarliga væl fyri. Teir høvdu ikki egið virki, men høvdu báðir gott og vællønt starv.

Sum dreingirnir vuksu til vísti tað seg, at Áki var væl vandur heimanífrá. Hann var røkin, var ikki oyðslutur við lummapengum og í dagliga umganginum við flokksfelagar og aðrar vinir var hann hjálpsamur, blíður og fryntligur. Hann gjørdist tí eisini væl lýddur millum fólk. Pápin hevði ikki stórvegis trupulleikar av honum, heldur ikki fíggjarliga. So leingi hann var ómyndugur rindaði hann sjálvandi fyri hansara uppihald. Men skjótt vísti tað seg, at Áki gjørdist sjálvbjargin. Hann byrjaði tíðliga at arbeiða, eisini meðan hann nam sær víðari útbúgving. Rættiliga ungur fekk hann gott starv, og hann kláraði seg væl fyri sína løn. Tá ið hann giftist og bygdi hús fekk hann størri fíggjarligar skyldur, men hann og konan arbeiddu bert nakað meir og royndu alla tíðina at klára seg sjálvi uttan at liggja foreldrunum til byrðu.

Eitt sindur ørðvísi gekst hjá Bárði. Hann vísti tíðliga lyndi at skáka sær undan ábyrgd. Hann vildi gjarna gera seg væl kendan hjá vinum sínum við at "traktera". Pápin forkelaði hann, og hvørja ferð á stóð gav pápin honum pening. Sum tíðin gekk og hann vaks til gjørdist hesar upphæddir størri og størri. Hóast pápin við hvørt helt, at tað var ov nógv av tí góða, lat hann seg altíð yvirtala at veita fíggjarligan styrk til sonin, sjálvt um hann sá, at peningurin ikki altíð fór til tað mest nyttuga. Bárður royndi eisini at útbúgva seg, men burtursæð frá almennum stuðli livdi hann bert av babbasa hjálp. Tað kom honum ikki til hugs at royna at klára seg sjálvan. Verri var, tá hann fekk starv. Hann kundi ikki klára seg við lønina, og í heilum kom hann til pápan at biðja um styrk. Til síðst gjørdu teir avtalu um, at hann hvønn mánað skuldi fáa eina ávísa, rættiliga stóra, upphædd frá pápanum, umframt sína løn. Eisini Bárður giftist. Men tá ið nú fíggjarligu skyldurnar gjørdist størru, legði hann ikki doyðin á at arbeiða meira. Nei hann fór aftur til pápan og bað um meira styrk. Sum vaksin gjørdist hann meir og meir ein babbasa drongur.

Men eina ferð varð heilt galið. Lønandi arbeiði hjá Bárði minkaði og hann vildi hava meira styrk frá gamla. Men nú helt pápin vera nóg mikið. Hann stongdi allar bankakonti hjá soninum. So nú stóð heilt í botni. Men Bárður tók seg nú saman eina tíð, og tað fór at ganga framá. Hann forvann rættiliga nógv hesa tíðina og kom aftur á føtur. Pápin helt, at nú átti fasti mánaðarligi stuðulin frá honum at kunna minka. Pápin var heldur ikki ungur longur. Men tá gjørdist Bárður ræðslusligin. Hann hevði alt sítt lív fingið vaksandi stuðul frá pápanum. Sjálvt um hann ikki longur hevði brúk fyri honum, kundi hann ikki hugsa sær at slept honum. Hann bønaði og bað tí um, at stuðulin mátti halda fram. Hann vitsti, at hann ongatíð aftaná myndinga aldur átti at liva av pápanum, men nú hevði hann vant seg til tað, og fyri hann var lívið í veruleikanum spilt, tí hann kom ongatíð at standa á egnum beinum, heldur ikki tá hann var fíggjarliga væl fyri. Tað gjørdist ein spurningur um hugburð og ábyrgd. Ikki um fíggjarliga førið.

Hetta kom mær til hugs, tá eg frætti, at 52 % av føroyingum framvegis eru í móti at minka um danska blokkstuðulin.

# Tveir tómar stólar í fólkatinginum?



**Jákup Fróði Djurhuus**
*Valevni Sambandsfloksins*

- Ella tvey virðilig umboð, sum eru har!!!!

Danir undrast. Tað standa tveir tómir stólar í fólkatinginum meginpartin av árinum.Har skuldi tveir vælupplagdir føringar siti og fylgt við. Men teir eru ikki har. Eru ikki til arbeiðis. Hevur tann persónur á tínum lista sum tú ætlar tær at velja, melda nóg greitt út fyri tær, at hann ætlar at røkja starvið sum eitt fulltíðarstarv, og siga øll onnur størv frá sær??

Lat tað vera avgerandi fyri, hvønn í tú setir krossin fyri Týsdagin á tínum lista.

Gott Sambandsval